HEILSA

Lagt til rættis: Vilmund Jacobsen

Nýggjasta tøknin og besta ljóðgóðskan

Umframt at arbeiða í høvuðsstaðnum, fer Hoyrnin við ávísum millumbilum eisini út um landið, og soleiðis verða tænastur veittar eitt nú í Klaksvík, Runavík, Vági og heima á Sandi

Hoyrnin, sum verður 11 ár í mars í ár og sum var Føroya fyrsta privata og góðkenda hoyriklinikk, bjóðar sínum viðskiftafólkum ráðgeving hjá útbúnum hoyriserfrøðingum.

Fyritøkan, sum húsast í Lucas Debesargøtu 3 í Havn, veitir viðskiftafólki vegleiðing um hoyriroyndir, val av hoyritólum, og her fært tú vegleiðing um stuðulsskipanir og prísir.

Hoyrnin er góðkend av føroysku heilsumyndugleikunum og av Delta Technology, og føroyski veitarin samstarvar eitt nú við heimsumfatandi fyritøkurnar, Oticon, Siemens, Phonak og Widex.

Tøkni og ljóðgóðska

Jutta Helgadóttir, sum eigur og rekur Hoyrnina, vísir á, at tá fólk hava brúk fyri hoyritólum, fylgir eisini eitt alment ískoyti við, og hetta ger, at fólk, sum hava hoyritrupulleikar, kunnu ogna sær hoyritól úr 2000 krónum og uppeftir.

- Við okkara royndum og góðu sambondum út í heim veita vit nýggjastu tøknina og bestu ljóðgóðskuna, sum er á marknaðinum, sigur hon.

- Allar mannagongdir og tól hjá okkum eru undir strongum eftirliti fyri at tryggja eina høga góðsku í øllum tænastum og veitingum, sigur Jutta Helgadóttir

Umframt at arbeiða í høvuðsstaðnum, fer Hoyrnin við ávísum millumbilum eisini út um landið, og soleiðis verða tænastur veittar eitt nú í Klaksvík, Runavík, Vági og heima á Sandi.

- Um heimasíðuna hjá okkum – www.hoyrnin.fo – sæst neyvari, nær vit eru á ymisku støðunum.

Uttan bílegging

Viðskiftafólk eru vælkomin inn á gólvið í Lucas Debesargøtu 3 í Havn, og opið er mánadag til og við fríggjadag frá klokkan 9-16.

- Vilt tú hava tíni hoyritól eftirhugd, stillað ella slangur og proppar skift, kanst tú koma inn á gólvið hvønn dag millum klokkan 15 og 16 - uttan at bíleggja tíð, sigur Jutta Helgadóttir.

Vit kunnu leggja aftrat, at hjá Hoyrini fært tú:

- Hoyritól úr 2000 krónum
- 14 daga óbindandi royndartíð
- Ókeypis hoyriroynd uttan bíðitíð
- ára trygdaravtalu
- Rentufría avgjaldsskipan
- Serkøna vegleiðing frá útbúnum hoyriserfrøðingum

SUDOKU-KAPPINGIN

Dagarnar 8. til 10 august verður landsins størsta tónleikatiltak hildið í Klaksvík. Summar Festivalurin bjóðar kendar altjóða bólkar og fjølbroytt úrval av tí besta á føroyska tónleikapallinum. Í tríggjar dagar ljómar tónleikurin á festivaløkinum, og millum pallarnar ber til at hugna sær, hitta fólk og fáa sær okkurt gott at eta ella drekka. Summar Festivalurin hevur kunngjørt Rasmus Seebach sum fyrsta høvuðsnavnið í 2019. Øll, ið senda loysnina á Sudoko inn komandi vikurnar, eru við í lutakastinum um eitt vikuskiftispass til Summar Festivalin. Loysnirnar skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 1. mars. Vinnarin verður kunngjørdur í blaðnum mikudagin 6. mars.

				6		5		9
		5	3	7			2	8
	3		8		2	7		
5								2
	6						7	
3								4
		8	7		3		1	
2	4			8	6	9		
1		6		9				

Vinn vikuskiftispass til Summar Festivalin 2019

Navn: _____

Bústaður: _____

Telefon: _____

Sendið til: Sosialurin, Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Merkið brævbjálvan "Sudoku"

Sosialurin